## Enduruppliv Summar-festivalin



Summarfestivalurin gevur nú tær, ið vitjaði festivalin í fjør høvið at enduruppliva partar av festivalinum, og fyri tey, ið ikki vóru har, møguleika at fáa ein smakksroynd. Á heimasíðuni undir video liggja brot við Hanus G. Johansen,Johnny Deluxe, Roger Hodgson og Kim Hansen Her er talan um inniligu morgunkonsertina við Roger Hodgson, ið framførir Give a Little Bit, Logical Song og Breakfast in America. Um eina rokkandi framførslu av Tú segði Bye hjá Kim og tá Johnny Deluxe við lagnum Drenge som mig, finguallan Vágsbø at hoppa á miðjari nátt.

## Føroyskur toppur á 15 teimum bestu



Eftir fleiri slakar vikur fyri føroyskan tónleik á 15 teimum bestu, sær nú betur út. Aðru viku á rað liggur besti nýggi bólkur í Føroyum Boys In A Band á ovastu rók við lagnum Super Contagious. Sic og To Dare To Risk To Regret er á 7. plássi og sostatt eisini í ovaru helvt av listanum, ið eisini telur lagið Flowerplayer hjá Kristleifi Zachariassen á 11. plássi. Eitt føroysk lag roynir seg á listanum hesa vikuna, tað er tittullagið Edelweiss av nýggju fløguni hjá Rasmusi Rasmussen.

## Vox Pop

**Vit spurdu nakrar áhoyrar hvat teimum dámdu kvøldið, og teir svaraðu soleiðis:**

**Navn:**
Ester Kristiansen
*Hvat dámdi tær kvøldið?*
Heilt forbannað gott.
*Hvør bólkur var best?*
Boys In A Band

------------------

**Navn:**
Súsanna Árting
*Hvat dámdi tær kvøldið?*
Tað rokkaði. Tey burdu gjørt sovorið oftari=)
*Hvør bólkur var best?*
Alt var genialt

------------

**Navn:**
Jannie Hammer
*Hvat dámdi tær kvøldið?*
Hettar er bara for feitt altso. Tað er svagligt.
*Hvør bólkur var best?*
Boys In A Band eru best í Føroyum

---------------------

**Navn:**
Gudmar Hansen (Elander keann)
*Hvat dámdi tær kvøldið?*
Skide feitt
*Hvør bólkur var best?*
Eg haldi The Dreams rokkar totalt.

# Trífald konsert í Mentanarhúsinum

**Leygarkvøldið var trífald konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. FUT skipaði fyri og tað vóru vælumtóktu bólkarnir Marius, The Dreams og Boys In A Band, ið spældu. Í millum konsertirnar vendið DJ Knýtil plátum**

KONSERT
*Elin Maria Ó. Olsen*



*Gittarleikarin í The Dreams Heini G. C. Andersen bløddi í fingrunum av harða gittarspælinum (savnsmynd)*

Hóast fólk høvdu tað á orði, at konsertin var avlýst, var hampuliga nógv fólk komið saman at lurta eftir bólkunum.

### Væl kend løg

Bólkurin Marius var fyrst á pallinum, og teir royndu seg bara heilt væl. Teir spældu nøkur av teirra væl kendu løgum, og nøkur fólk vóru við uppá tað og dansaðu til hansara góða tónleik serliga vóru tað Paven, Sky is our home og Staight lines, ið vóru væl umtóktir.

Teir spældu sera væl og ljóðgóðskan var eisini frálík.

Teimum dámdi væl at spæla í kvøld. Tað var ordiliga kul hildu teir. Nú er tað eisini so langt síðan teir spældu síðst, so tað var sakin.

Nú í nærmastu framtíð ætla teir at arbeiða við gomlu sangum teirra, og skriva nakrar nýggjar. Eisini ætla teir at spæla inn nakrar demoir nú.

### Bløðandi gittarleikari

Síðan spældu The Dreams. Teir vóru komnir heilt úr Danmark fyri at spæla. Hjá teimum gekk eisini heilt væl. Teir spældu nøkur løg, frá fløguni hjá teimum, Tazy. Millum teirra var hittið Sasasasa, og so spældu teir eisini nógv coverløg. Har vóru nógv fólk, sum rockaðu og sungu við til teirra punk musik.

Hjá teimum gekk tað so vilt fyri seg, at guitaristurin Heini G. C. Andersen fór at bløða í fingrunum av sínum guitarspælið.

Tað ljóðaði sera væl.

Teir vóru sera glaðir fyri at vera heima í Føroyum og spæla. Tað var ordiliga feitt søgdu teir. Fólkini vóru mega við uppá tað.

### Sera festligt

Aftan á The Dreams, kom tað tey flestu høvdu bíða eftir: Boys In A Band skuldu spæla. Tá komu næstan øll fram at rocka til teirra alternativa indie rock musik.

Tað var sera festligt og fólkinum dámdi tað væl.

Teir spældu við tí vanliga Boys In A Band stílinum, og bæði ljóðið og framførðslan vóru framúrskarandi.

Teir søgdu at tað føldist væl at spæla, men teir hava verið feitari. Áhoyrararnar vóru eisini feitir. Nú ætla teir, at vinna heimin. Til tíðarinar fylling fara teir út í verðina at spæla. Alt mennist, og fyri teir, gevur tað onga meining, at standa í stað.

Alt í alt, var tað ein sera góð konsert, har fólk sóu út til at hava tað sera stuttligt og hugna sær frálíkt.

# Sic og 200 í Mentanarhúsinum

**Fríggjakvøldið var konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði við Sic og 200. Konsertin var eitt sindur øðrvísi enn tær vanligu konsertinar í Fuglafirði plaga at vera**

KONSERT
*Elin Maria Ó. Olsen*

Tá ið bólkarnir ikki spældu, var í staðin fyri tað vanliga nýmótans R&B'ið og rap'ið, tungmálmstónleikur og okkurt techno har ímillum. Tað var eitt verðuligt "headbangersball", og tað var fyri tað mesta eitt stað, har ungdómar, í svørtum klæðum og svartari sminku, kundu hittast.

Har var ikki so nógv fólk, sum tað plagar at vera í Mentanarhúsinum, men har var kortini eitt sindur.

200 spældu fyrst, og har stóðu nøkur fólk fremst og rockaðu til teirra punk musik. Teir spældu nøkur av teirra kendu løgum, og tað var finasta slag, hóast ljóðgóðskan ikki var heilt sum hon skuldi, men bólkurin spældi líka væl, sum altíð.

Tá ið sangurin hjá 200 "Drotningavitjan" skuldi spælast, komu Sic eisini á pallin, og teir framførdu hann saman. Tað var alvorliga feitt.

Síðan skuldu Sic spæla. Tá kom meira spenningur í, og nærum alt fólkið fór fram at rocka til teirra ógvusliga tungmálmstónleik.

Teir spældu øll løgini, sum eru á nýggju fløgu teirra og so eisini eitt coverlag.

Teir spældu serstakliga væl, og ljóðgóðskan var betri enn hon hevur verið á onkraðri aðrari konsert hjá teimum. Samanumtikið var framførðslan hjá teimum bara heilt góð.

Umframt at hoyra Sic spæla, kundi tú keypa nýggju fløguna hjá Sic „Pandemonium", Sic patches, Sic plakatir og Sic t-shirts har.



*Sic fingu alt á kók við sínum ógvusliga rocki*
*savnsmynd*